Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Sambýlið á Mýrini

Spurningar:

1. Hvat kostar bygningurin Sambýlið á Mýrini, nú hann er liðugur?
2. Hvør er fermetrakostnaðurin á bygninginum alt íroknað uttan ognan av lendi, nú hann er liðugur?
3. Hvussu er fíggjarliga býtið millum handverkaraútreiðslur, ráðgeving, ognan av lendi og annað?
4. Hvussu var byggingin skipað?
5. Hvussu er mann nøgdur við úrslitið, nú bygningurin er liðugur?
6. Hvørjar orsakir metir mann vera til, at byggingin hevur gingið, sum hon hevur?

Viðmerkingar:
Í 2021 samtykti Løgtingið dagførda verklagslóg til at byggja vardan bústað á Mýrini í Hoyvík. Nú byggingin er liðug, og bústaðirnir verða tiknir í nýtslu, og tað í løtuni verður viðgjørt, hvussu bygging av almennum bygningum skal skipast í framtíðini, tykist viðkomandi at fáa til vegar upplýsingar um, hvussu hendan bygging hevur gingið.

Á Løgtingi, 23. november 2023

Eirikur í Jákupsstovu